52-158/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 158/20 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, um sensur í mun til stuðul til filmsverkætlanir hjá ungum listafólki

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Er løgmaður, ið hevur eftirlit við landsstýrisfólkunum, nøgdur við háttin, landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum umsitur játtanina til filmsframleiðslu, nú hann enn einaferð setur faklig tilmæli til viks og noktar ávísum ungum listafólki stuðul, tí verkið hóvar landsstýrismanninum illa?
2. Metir løgmaður hetta vera í samsvari við góðan fyrisitingarsið og at umsita játtanina til film á fullgóðan hátt, tá ung evnarík listafólk ikki fáa stuðul, orsakað av, at landsstýrismanninum persónliga ikki dámar innihaldið?
3. Heldur løgmaður tað vera sakligar grundgevingar, sum góð fyrisiting krevur, at til dømis seksuelt innihald ella banniorð eru grundgevingar fyri at nokta ungum filmsspírum stuðul úr filmsgrunninum?

Svar til 1,2 og 3:

Tá ið filmsjáttanin fyrstu ferð varð sett á fíggjarlógina í 2014, varð ein filmsráðgevaskipan sett í verk í samráð við filmsumhvørvið. Endamálið var at seta fólk við serligum kunnleika um filmsgerð at meta um umsóknirnar. Leiðreglur fyri ein breiðan filmsstýrisbólk eru gjørdar og eisini leiðreglur fyri filmsráðgevarnar. Tað er filmsstýrisbólkurin, ið velur ráðgevarnar, sum fyrisitingin í ráðnum síðani heitir á. Ráðgevarnir sita í tvey ár í senn og kunnu verða settir aftur.

Filmsstýrisbólkurin hevur ikki ávirkan á stuðulstilmælini, men hevur yvirskipaða arbeiðið um hendið at skipa leistin fyri, hvussu almennur stuðul verður veittur til føroyska filmsgerð. Ráðgevarnir skulu grundgeva fyri til- og frámæli. Tað er ein líknandi skipan, tá ið talan er um stuðul til yrkisleiklist. Tá er tað Leiklistaráðið, ið ger tilmælið.

Hetta er aðru ferð, at eitt tilmæli ikki er fylgt (Skúlascam og so nú Sæla).

Soleiðis, sum lógin er orðað í § 2 stk. 2, er tað landsstýrismaðurin, sum tekur avgerð um, hvør ið skal fáa stuðul. Tilmælini, sum hann fær í hesum sambandi, eru ikki løgfrøðiliga bindandi, tí um so var, var ongin grund til í lógini at leggja heimildina til landsstýrismannin. Tá hevði heimildin verið løgd til ráðgevarnar at taka avgerð.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Atlitini, sum landsstýrismaðurin kann taka í samband við at lata stuðul, fevna rættuliga breitt, og tí er tað ikki ósakligt at leggja dent á málburð ella kynsligt innihald í filmsverkætlanini, søkt verður um stuðul til.

Sum løgmaður fari eg ikki innihaldsliga at meta um avgerðina hjá landsstýrismanninum. Sbr. stýrisskipanarlógini § 33 stk. 1 býtir løgmaður málsøki landsstýrisins millum landsstýrismenninar. Teir sita so fyri málsøkjum sínum hvør sær. Løgmaður leggur seg vanliga ikki útí einstøku avgerðirnar hjá landsstýrismonnunum, uttan so er, at ólógliga er atborið, ella tað als ikki ber til politiskt at liva við avgerðini.

Eg kann leggja afturat, at filmsráðgevararnir hava áður mælt frá at stuðla hesari filmsverkætlanini, sum nú er broytt nakað.

Í yvirskriftini til fyrispurningin sigur spyrjarin, at talan er "um sensur í mun til stuðul til filmsverkætlanir hjá ungum listafólki". Her haldi eg, at spyrjarin yvirtulkar avgerðina. Sensurur er, tá ið almennur myndugleiki ikki loyvir útgávu av tilfari, fyrr enn myndugleikin hevur góðkent tilfarið. Tað er tað als ikki talan um í hesum føri. Filmurin kann frítt gerast, uttan at landsstýrið blandar seg. Hann fær bara ikki almennan peningaligan stuðul.

Í Tinganesi, 8. juni 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður